# Kunnandi fundur um yrkisútbúgving á Fiskivinnuskúlanum

**Týsdagin var ein kunnandi fundur fyri fiski- og alivinnunum um nýggju útbúgvingarmøguleikarnar á Føroya Fiskivinnuskúla**




*Vinnuligi áhugin fyri nýggju yrkisútbúgvingini á Føroya Fiskivinnuskúla tykist at vera stórur*

ÚTBÚGVING
*Solby A. Eliasen*

Á fundinum, sum var fyri fiski- og alivinnuna varð greitt, at áhugin innan vinnuna at taka lærlingar inn er stórur. Jákup Andreasen, skúlastjóri, sigur, at har søgdu fleiri seg vera sinnað at taka lærlingar inn, um tey søkja.

Eisini veit hann at siga, at áhugin millum lesandi avgjørt er tilstaðar, tí fleiri hava ringt til skúlan og spurt seg fyri um útbúgvingina, og hvussu tey skulu gera fyri at søkja.

Hendan nýggja útbúgvingin er ein praktisk vinnulívsútbúgving, har næmingur, sum ætlar sær undir hana ikki skal søkja inn á sjálvan fiskivinnuskúlan, men finna sær eitt góðkent lærupláss millum 12 til 24 vikur, áðrenn skúlin byrjar í august. Tá tey hava funnið eitt lærupláss, ganga tey tað fyrsta árið í skúla, og síðani fara tey í læru. Útbúgvingin tekur trý ár tilsamans, og fyri uttan skúlagongd tað fyrsta árið og 12 vikur í triðja árinum, er næmingurin fyri rest í læru á einum virki innan ali ella fiskivinnuna. Um ein næmingur fer í læru á einum kryvjivirki, so skal hann eisini á eitt annað virki innan alivinnuna, tí tað verður ikki mett at vera nóg breitt øki bert at vera á einum kryvjivirki. Eftir trý ára læru og skúlatíð er ein næmingur útlærdur sum alari ella fiskavirkari.

– Ein næmingur í hesi útbúgvingini skal gjøgnum allar tær ymisku arbeiðsgongdirnar á sínum læruplássi, greiðir Jákup Andreasen frá.

Sum er eru bert tvey, sum eru farin í holt við hesa útbúgvingina. Annar er í alivinnuni og hin í fiskivinnuni. Men tað kemur av, at útbúgvingin varð ikki sett í verk fyrr enn á sumri í fjør, og tá var ov seint at fara í gongd við kunnandi og lýsandi arbeiði. Men nú hevur Fiskivinnuskúlin av røttum kunnað gjørt vart við nýggju møguleikarnar.

Men skúlastjórin sigur tó, at hann kann ikki siga nakað nágreiniligt um undirtøkuna, tí sum sagt, so skulu næmingarnir ikki søkja inn á skúlan men finna eitt lærupláss.

– Av tí at læruplássið ikki skal verða funnið fyrr enn millum 12 og 24 vikur áðrenn skúlin byrjar, so ber slettis ikki til hjá mær at siga nakað um undirtøkuna enn, sigur Jákup Andreasen.

Sum er, er ein fyrsti flokkur í Fiskivinnu-skúlanum, og tey bæði, sum eru undir nýggju útbúgvingini ganga í tí flokkinum. Hetta ber væl til, og tað verður helst so eisini komandi skúlaár.

– Tað valdast sjálvandi undirtøkuni fyri tí nýggja, tí um tað fer upp um eitt vist, so kann tað fara at gerast neyðugt at gera ein serstakan flokk við bara teimum, sigur skúlastjórin á Fiskivinnuskúlanum, Jákup Andreasen.

Tað ber nú til at nema sær tvær ymiskar útbúgvingar á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna. Eina yrkismiðnámsútbúgving, sum er á sama støði sum hinar miðnámsútbúgvingarnar ella hesa nýggju útbúgvingina, sum varð sett í verk seinasta summar.

# Atlantis hava høll innan tvey ár

**– Um Atlantis skal yvirliva, tá tunnilin er komin undir Leirvíksfjørð, má húsið byggjast út við eini høll til 1000 fólk við hartil hoyrandi hentleikum, heldur Jógvan Eliasen, dagligur leiðari**

MENTUNARHÚS
*Solby A. Eliasen*



*Jógvan Eliasen, dagligur leiðari í Atlantis í Klaksvík, sigur, at neyðugt er við útbygging av Atlantis, um húsinum skal verða lívi laga, tá undirsjóvartunnilin er komin um Leirvíksfjørð*

**Klaksvík:**
– Atlantis er ov lítið til at hýsa størri tiltøkum og konsertum. Við sínum 112 stólum á einum skrágólvi eru møguleikarnir ikki nógvir í húsinum.

Hetta sigur dagligi leiðarin í Atlantis ,Jógvan Eliasen. Hann hevur sitið í starvinum í gott ár nú, og hann heldur, at tað verður ongin møguleiki hjá Atlantis at yvirliva, tá tunnilin er komin ígjøgnum, um ikki ein høll til 1000 fólk við øllum hentleikum verður veruleiki innan fyri tvey ár.

– Vandin fyri, at klaksvíkingar fara at leita sær undirhald aðrastaðir, tá tunnilin er komin, er sera stórur, tí Atlantis nøktar ikki tann tørvin sum er, heldur hann.

Jógvan greiðir frá, sum nú er, so kunnu tey veruliga peningagevandi tiltøkini, sum til dømis stórar konsertir, dansur, konferansir, framsýningar og líknandi, ikki haldast í húsinum , tí umstøðurnar ikki eru til tað. Eitt er skrágólvið við sínum avmarkingum, men Jógvan vísir eisini á, at har er bert ein lítil foyerur, og kjallarahæddin í húsinum er langtíðarútleigað til Klaksvíkar Sjónleikarafelag.

Tað, sum Jógvan hevur hugsað sær, er ein høll við sløttum gólvi, ið skal kunna rúma einum 1000 fólkum, tá konsert og onnur dansitiltøk eru. Og annars rúma einum 300-400 fólkum til virksemi, har stólar verða settir upp. Eisini vísir hann á, at ein ídnaðarkøkur og goymslupláss eru alneyðug. Við hesum heldur Jógvan at tað eigur at bera væl til at útbyggja Atlantis til ein veruligan mentunardepil, ið kundi tænt sum miðstøð fyri allar mentanarligar stovnar í býnum.

– Tað er upplagt at leggja kunningarstovuna, leiðsluna fyri Norðoya Fornminnissavni, umframt fyrisitingina av frítíðar-og ítróttarráðnum í býnum í Atlantis, so ein veruliga fær eina livandi eind við trivnaði fyri tey, ið har koma at starvast, heldur dagligi leiðarin í Atlantis.

### Útbyggingarmøguleikar

Atlantis kann byggjast út allar vegir uttan móti fótbóltsvøllinum. Jógvan hevur sjálvur gjørt onkrar skitsur yvir, hvussu húsið kann byggjast út eftir verandi fortreytum, ið hann hevur latið mentanarnevndini í Býráðnum. Við hesi loysnini, hevur hann hugsað sær, at inngongd, wc, foyer og annað verður flutt vestur móti Bøgøtu, og at alt plássið frá verandi sali og yvir í móti skýlinum verður nýtt til ein nýggjan sal við sløttum gólvi, til køk og goymslurúm við meira. Loftshæddin verður eisini rættuliga nógv økt við hesum uppskoti.

Sjálvur heldur Jógvan tó ikki, at hetta uppskotið er meira enn næstbest. Hann heldur, at teir stóru útbyggingarmøguleikarnir liggja norðanfyri húsið, sum tað er í dag. Men hetta er tó treytað av, at vegurin framvið húsið verður avskorin, so alt økið frá Bøgøtu og eystur um skýlið við fótbóltsvøllin verður tøkt byggiøki. Og her vísir Jógvan á, at tá ið rundkoyringin í miðbýnum verður veruleiki einaferð í summar, er als ikki tørvur á at koyra framvið norðanfyri Atlantis.

– Tí átti kommunan at umrøtt hetta málið beinanvegin og fáa vegin avbyrgdan, tá rundkoyringin verður tikin í nýtlsu, sigur Jógvan Eliasen, sum ynskir, at avgerðirnar verða tiknar nú, og at borgarar í Klaksvík fara at stíga fram og siga sína hugsan.



# Eldur umborð á Fiskivarða

*- Høvuðsmotorurin og ljósmotorurin steðgaðu, og vit lógu við neyðljósum. Vit vónaðu, at eldurin fór at kódna, tá ið eingin ilt var eftir, sigur ein av manningini, sum var við Fiskivarða, tá ið eldur kom í maskinrúmið*




**Um gott 19-tíðina næstsíðsta mikukvøld um kom eldur í maskinrúmið umborð á línubátinum, Fiskivarða úr Oyndarfirði, meðan teir vóru á fiskileið í ein útnyrðing úr Mykinesi**

ELDUR
*Vilmund Jacobsen*

- Vit høvdu havt eina fulla setu og høvdu sett seks stokkar av línu útaftur. Júst, meðan vit skuldu fara at skaffa, fór alarmurin í gongd, og nógvur roykur var at síggja í maskinrúminum.

Soleiðis greiðir ein av monnunum, sum var við Fiskivarða hendan túrin, frá.

Veðrið var gott á leiðini, og manningin avgjørdi at ringja til Brimil.

Brimil svaraði ikki, men tá ið ringt varð til Tjaldrið, gekst betur.

- Tjaldrið var tá statt í Kalsoyarfirði, og tveir til hálvan triðja tíma seinni vóru teir hjá okkum.

Maðurin sigur, at eingin panikkur var umborð.

### Stongdu fyri luftini

- Vit hildu tað vera best at steingja fyri luftini til maskinrúmið, so eingin ilt slapp niður. Hetta var tað einasta, vit kundu gera, tí hugsingur var ikki um at fara niður at royna at basa eldinum.

Í byrjanini visti manningin ikki, hvar eldurin var, men seinni vísti tað seg, at eldur var omaná motorinum har aftur, sum útstoyt, luftinnsúgving og oljuføringin er.

- Høvuðsmotorurin og ljósmotorurin steðgaðu, og vit lógu við neyðljósum. Vit vónaðu, at eldurin fór at kódna, tá ið eingin ilt var eftir.

Maðurin sigur, at tað einasta, teir kundu siga manningini á Tjladrinum, var, at støðan vísti seg at vera undir eftirliti á tann hátt, at hitin, sum merktist úr maskinrúminum, øktist ikki.

- Tað vísti seg eisini, at eldurin breiddi seg ikki um maskinrúmið, og umleið hálvan annan tíma eftir, at eldurin var kyknaður, sluppu vit niður í maskinrúmið.

Tjaldrið var á Runavík við Fiskivarða klokkan gott 04 morgunin eftir.

Maðurin heldur, at tað var ein hjálp í støðuni, at nógv olja var í tangunum, sum eru har afturi í maskinrúminum.

Hitin var so nógvur, at verri kundi verið vorðið, um tangarnir vóru hálvtómir.

### Gongur ein tíð

Alt tað elektriska í maskinrúminum á Fiskivarða er farið, bæði eltalvur og kaðlar, og tá ið vit frættu, var óvist, um maskinan hevur fingið nakran skaða.

Tað gongur helst ein tíð enn, áðrenn Fiskivarði verður klárur at fara til fiskiskap aftur.

Við skipinum eru seks mans, og skipari er Fróði Ejdesgaard.

# Grækarismessuhald í Havn



**Tíðindaskriv**
*Skótalið Sigmunds Brestissonar*

Sunnudagin 9. mars kl. 15.00 verður Grækarismessuhald á Vaglinum.

Skótarnir ganga skrúðgongu, Havnar hornorkestur spælir og kórið Sólarmagn syngur.

Annika Wardum Joensen flytur fram røðu.

Fyrsta Grækarismessan var hildin í 1943, og var tað Sverri Paturson sum heitti á skótarnar um at halda henda dagin.

Allir skótar í Havnini skulu møta ein tíma áðrenn í skótahølum sínum.

Skrúðgongan fer frá Vágsbotni kl.14.45.

Gingið verður eftir Bøgøtu-Tróndargøtu-Niels Finsensgøta-oman á Vaglið.

